# Bárður Laksáfoss nýggi leiðarin

**Fuglfirðingurin, Bárður Laksáfoss, verður nýggi leiðarin á Platform og Eclipse**

NÝGGJUR LEIÐARI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at tey trý skeinkistøðini, Platform, Café Natúr og Eclipse leggja saman. Ein av eigarunum, Havgrímur Johannesen, greiddi frá, at nýggja felagið arbeiddi við at seta ein dagligan leiðara, ið skal taka sær av samskipanini hjá teimum trimum feløgunum.

Nýggi leiðarin er nú settur. Tað er fuglfirðingurin, Bárður Laksáfoss, sum hevur fingið starvið. Uppgávan hjá honum er í høvuðsheitum at standa fyri tí dagliga virkseminum á Platform og Eclipse. Café Natúr hevur sum er ein dagligan leiðara, og hann heldur fram í tí starvinum. Bárður Laksáfoss hevur arbeitt á Platform í hálvtannað ár. Í summar fekk hann starv sum ein av barrleiðarunum á Eclipse.

## Eingin kollvelting

Nýggi leiðarin, Bárður Laksáfoss, sigur, at kundarnir skulu ikki vænta sær tær stóru broytingarnar alt fyri eitt.

– Í fyrstani verður alt tað sama. Vit fara at leggja okkum eftir somu aldursbólkum og sama tónleiki í Eclipse og Platform. Eg ætli at føla meg fram, og so fáa vit at síggja hvørjar broytingar verða gjørdar við tíðini sigur Bárður Laksáfoss.

Eclipse hevur, síðan staðið lat upp, lagt seg eftir einum eldri kundaskara, enn Club 20 gjørdi í síni tíð. Leygarkvøld er aldursmarkið 21 ár, meðan tey 18 ára gomlu sleppa frammat fríggjakvøld. Platform hevur 20 árs aldursmark leygarkvøld og 18 ár fríggjakvøld.

Tey átjan ára gomlu hava sostatt ongan góðan á Platform ella Eclipse leygarkvøld.

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo



JÓLABORÐHALD

Komið við á sera hugnaliga JÓLAFERÐ við Norrönu og haldið Jólaborðhald umborð.

Prísur fyri hvønn
úr kr. 600,-
Matur & drekka ikki íroknað

JÓLA-CRUISE ERU HESAR DAGAR:
- 20.–24. nov.
- 27. nov. –1. des.
- 4.–8. des.
- 11.–15. des.

UNDIRHALD
MATUR

**Úr havinum**
Stórt sildaborð
Roytkur og urtaviðgjørdur laksur
Rækjur og skeljadjór

**Alskyns steikir so sum:**
Stokt dunna við súreplum og sviskum
Fleskasteik við reyðkáli
Roastbeef við remuladu og stoktum leyki
Heilstokt lambstjógv
Heilstoktur oksaháryggur

**Flógvir rættir so sum:**
Tartelettir við góðari fyllu
Fiskaflak við remuladu
Nýstoktar frikadellur við reyðkáli

**Stórt ostaborð**
Við stórum úrvali av ostum, víndrúvum o.l.

**Dessertborð við m.a:**
Heimagjørt rís à la'mande við kirsiberjasós
Fruktsalat við rákremi
og alskyns køkur

Umframt stórt jólaborðhald, verður hvørt kvøld undirhald við føroyskum bólkum og einstaklingum.

**20. – 24. Nov:**
**Undirhald:** Robert McBirnie
**Orkestur:** Jóan Magnus Band

**27. Nov.– 01.Des:**
**Undirhald:** Hilmar Jan Hansen
**Orkestur:** Havkallar v/m.ø. Ronnie Nielsen

**04. – 08. Des:**
**Undirhald:** Robert Mc.Birnie
**Orkestur:** Vestmenn

**11. – 15. Des:**
**Undirhald:** Hilmar Jan Hansen
**Orkestur:** Terje Rasmussen Band

JÓLAKEYP
HUGNI

Keypið jólagávurnar á ferðini
Meðan Norröna liggur í Hanstholm verður skipað fyri innkeypstúri til Thisted.



SMYRIL LINE

†

Kunngjørt verður fyri ætt , vinum og kenningum, at okkara elskaða kona, mamma, dóttir, systir, sonarkona og svigarinna



**Anna Maria í Skorðastovu**
**Havn**

andaðist mánadagin 27 oktober, 39 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Suni, Høgni og Guðrið**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður, pápi, abbi og verfaðir okkara

**Jógvan Johannesen**
ættaður úr Hvalvík
búsitandi í Tórshavn

andaðist 26. oktober í Keypmannahavn, 84 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 1. november kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Maria og børnini**

## Tøkk

fyri sýnda samkenslu, tá okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Elina B. Simonsen**
**Norðradalur**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til prestar, sangarar og kirkjutænarar.
Eisini ein tøkk til tey mongu, ið fylgdu og sendu blómur og kransar.

**Børnini**





atlantic.fo | kall.fo | mmr.fo | gransking.fo | tunnil.fo | biblian.fo | gjogv.fo | sansir.fo | bitland.fo

Kent Christensen, sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways

# "Framkomna heimasíðan frá Sansum er týdningarmikil liður í okkara marknaðarføring"

Heimasíðan frá Sansum hevur sera stóran týdning fyri Atlantic Airways. Har sært tú nýggjastu tilboðini, nær flogfør koma og fara, og um tey eru seinkað. Eru tey seinkað, sært tú, nær ið væntað verður, at tey lenda.
Á heimasíðuni kanst tú síggja galdandi og komandi ferðaætlanir. Tú kanst melda teg til Club Atlantic, ið tryggjar tær, at tú fært sendandi sertilboð áðrenn øll onnur.
Onkuntíð hava vit selt ferðaseðlar á uppboði. Eisini eru loftmyndir av Føroyum, ið eru tiknar úr tyrlu og flogfari.
Tað nýggjasta er, at tú kanst keypa ferðaseðilin á heimasíðuni.

Okkara heimasíða er í veruleikanum tríggjar heimasíður í einum: Har eru ein føroysk, ein donsk og ein ensk. Hesar heimasíður venda sær til hvør sín kundaskara.
Heimasíðan er sera løtt at nýta. Ert tú toluliga vanur við teldu, er skjótt at læra at brúka heimasíðuskipanina. Fyri okkum er tað eisini ein fyrimunur, at vit kunnu venda okkum til royndu teknararnar og tekstfólkini hjá Sansum, tá ið arbeiðið at snikka eina síðu saman skal vera serliga væl úr hondum greitt. Vanligar síður geri eg sjálvur ella onkur annar av okkum hjá Atlantic Airways.

SANSIR

Tinghúsvegur 47 | Tel 355 355 | Faks 355 350 | www.sansir.fo | info@sansir.fo